# Landssjúkrahúsið søkir eftir yvirtannlækna

## Starvið sum yvirtannlækni á Skurðdeplinum er leyst at søkja til setan skjótast gjørligt ella eftir avtalu

Umsøkjari við breiðum royndum innan alt frá tann-, munn- og kjálkaskurðviðgerð til viðgerð av menningartarnaðum og børnum hevur fyrimun. Heitt verður eisini á umsøkjarar við øðrum bakstøði at søkja.

Skurðdepilin hevur sergreinarnar ortopedi, gynekologi og obstetrik, parenkymskurðviðgerðir, oyrna-, nasa- og hálsdeild, og umfram eygnadeild eisini tannlæknavirksemi.

Skurðdepilin hevur 9 yvirlæknar, harav 3 eygnalæknar og ein oyrna-, nasa og hálslækna og 7 yngri læknar. Yngru læknarnir eru býttir upp í 4 basislæknar og ein introduktiónslækna. Hini lækna-størvini eru ikki flokkað (klassifiserað).

**Føroyska heilsuverkið**

Landssjúkrahúsið hevur 180 seingjarpláss. Útyvir Skurðdepilin er eisini medisinskur depil, psykiatriskur depil, intensivur- og diagnostiskur depil á Landssjúkrahúsinum. Landssjúkrahúsið hevur tætt samarbeiði við útlendsk sjúkrahús, har næsti samstarvsfelagin er Ríkissjúkrahúsið og onnur lond í útheiminum eru eftir tørvi.

**Tannlæknavirkið**

Tannlæknavirkið er staðsett í tilknýti við Oyna-, nasa og hálsdeildina. Arbeiðið á klinikkini er í høvuðsheitum visitatión, kanning og viðgerð av ávístum sjúklingum. Víðari visitatión av sjúklingum til meira serviðgerðir í útheiminum er eisini ein partur av arbeiðinum.

**Førleikakrøv**

Vit ynskja, at starvið verður sett av tannlækna við breiðum fakligum bakstøði. Roknað verður við, at viðkomandi er sinnað/ur til at verða við í einari víðari útbúgvingartilgongd, um tað verður neyðugt. Tað verður sett neyðugt tilfeingi av til førleikagevandi tiltøk.

**Lønar- og setanarviðurskifti**

Setanarmyndugleikin er sjúkrahúsleiðslan á Landssjúkrahúsinum.

Starvið er innskipað smb. avtalu millum Dansk Tandlægeforening og Danske Regioner.

**Fleiri upplýsingar**

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Tummas í Garði, varastjóra, tlf. 304500, lokal 1002 eller til Astu Joensen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing á Skurðdeplinum, lokal 1003.

**Umsóknarfreistin**
**er 30. desember 2010**

Sosialurin 341800







## Sjúkrarøktarfrøðingur til Barnadeildina B5

### Á Barnadeildini er eitt fast fulltíðarstarv í skiftandi vaktum leyst at søkja til setan 1. januar 2011 ella eftir avtalu. Møguleiki er fyri lægri brøki

Barnadeildin hevur pláss fyri 7 børnum í aldrinum 0 - 14 ár. Deildin hevur eisini nógv ambulant virksemi.

**Arbeiðsuppgávur í høvuðsheitum**
- røkt og viðgerð til børn í aldrinum 0 - 14 ár

**Vit kunnu bjóða**
- góða innleiðslu
- positivt tvørfakligt samstarv
- fakliga dugnaligar og virknar starvsfelagar
- fjølbroyttar arbeiðsuppgávur við nógvum avbjóðingum

**Krøv til umsøkjaran**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- góð samstarvsevni
- fakligan áhuga innan røkt og viðgerð av børnum
- telduførleika á brúkarastøði

Nærri fæst at vita frá Sólfríðu Helmsdal, deildarleiðara, tlf. 304500, lokal 6055, lssolhe@ls.fo ella frá Ingun Gaardbo, leiðandi sjúkrarøktarfrøðingur, lokal 6102, lsingga@ls.fo

Lønar- og setanartreytir smb. sáttmála millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknarfreistin**
**er 20. desember 2010**
**kl.12.00**

Samrøður væntast at verða í viku 52

## Varaleiðari til Barnadeildina B5

### Eitt fulltíðarstarv sum varaleiðari til Barnadeildina er leyst at søkja til setan 1. januar 2011 ella eftir avtalu. Møguleiki er fyri lægri brøki.

Barnadeildin hevur pláss fyri 7 børnum í aldrinum 0 – 14 ár. Deildin hevur eisini nógv ambulant virksemi.

**Vit kunnu bjóða**
- góða innleiðslu
- eitt arbeiði, ið er fjølbroytt við nógvum avbjóðingum, sum ger starvið sera áhugavert
- fakliga dugnaligar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samstarv

**Krøv til umsøkjaran**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- prógv sum kliniskur vegleiðari
- fakligan førleika í røkt og viðgerð innan pædiatri
- góð samstarvsevni
- áhuga í leiðslu
- áhuga í fakligari menning av starvsfólkum
- sjálvstøðug/ur, kreativ/ur og hava visiónir
- teldufórleika á brúkarastøði

Nærri fæst at vita frá Sólfríðu Helmsdal, deildarleiðara, tlf. 304500, lokal 6055, lssolhe@ls.fo ella frá Ingun Gaardbo, leiðandi sjúkrarøktarfrøðingur, lokal 6102, lsingga@ls.fo

Lønar- og setanartreytir smb. sáttmála millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknarfreistin er 20. desember 2010 kl.12.00.

Samrøður væntast at verða í viku 52

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ

*Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skal sendast til:*

***Landssjúkrahúsið***
***Lønar- og starvsfólkadeildin***
***FO-100 Tórshavn***